# Jólahús í Vágsbotni

Í sambandið við at jólaskipið kom á Havnina, lat Miðlahúsið í Vágsbotni dyrnar upp fyri børnum og foreldrum. Við jólatræið, karamellum, drykkivørum og horntónleiki, var góður jólahýrur í Vágsbotni.

Tá jólamenn komu á gátt gjørdist løtan enn hugnaligari og jólaligari. Mjólkavirkið Búnaðarmanna bjóðaði øllum tystum børnum poptop og kakao mjólk, meðan Rasmussen og Weihe bjóðaðu karamellir. Eisini tey vaksnu kundu fáa sær tað søta, ella ein kaffimunn, um hugurin var til tað.

Ein lærari og núverandi og fyrrverandi næmingar á Musikkskúlanum stóðu fyri tónleikinum

Í sambandi við hetta tiltakið varð bakgarðurin tikin í nýtslu fyrstu ferð. Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum sigur við portalin, at ætlanin er, at almenningurin skal hava atgongd til bakgarðin í dagtímunum. Garðurin er hugnaligur og skal eins og miðlahúsið sjálvt gerast ein miðdepil í Vágsbotni.



























